## Bernanke ársins maður

Tíðarritið Time hevur valt amerikanska tjóðbankastjóran, Ben Bernanke, til "Ársins mann 2009". Millum teirra, sum fyrr hava fingið hetta heitið, kunnu nevnast Barack Obama, Vladimir Putin og Jóhannes Páll pávi sáli. Ben Bernanke ásannaði fyri stuttum, at mistøk vórðu gjørd ymsastaðni í sambandi við kreppuna á fíggjarmarknaðinum. Eitt nú helt hann, at tað almenna áti at kravt betri gjaldføri í bankunum. Starvstíðin hjá Ben Bernanke sum tjóðbankastjóri fer at styttast, men Senatið fer uttan iva at geva honum eitt skeið afturat, skrivar Reuters.




## Varðveita Auschwitz

Týska stjórnin hevur givið einum altjóða grunni 60 milliónir evrur ella 446 milliónir krónur, sum skulu brúkast til at varðveita ta nazistisku týningarleguna Auschwitz-Birkenau í Pólandi sum savn. Leiðslan í grunninum sigur, at tann týska gávan kann fíggja helmingin av tí, sum tað kostar at varðveita savnið. Polsku myndugleikarnir eru eisini sera fegnir um ta týsku gávuna. Fyrrverandi polski uttanríkisráðharrin Wladyslaw Bartoszewski, sum sjálvur var fangi í Auschwitz-Birkenau, rósti í gjár Týsklandi fyri at vísa ábyrgd fyri søguni, sum hann málbar seg.

# longsti kilometur





*Stórur partur av nevndini hjá Vága Floghavn var til viðgerðina av vøllinum í tinginum í gjár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

eisini fólk kring høvuðsstaðin, sum tosa heitast fyri at bíða eftir kanningum við Glyvursnesi, ið koma í vár, sum skulu vísa vind viðurskiftini har.

### Vága Floghavn

Í tinginum í gjár vóru eisini fólk umboðandi Vága Floghavn. Millum onnur Kitty May Ellefsen og Jóhan í Niðristovu, sum er flogskipari, starvast hjá Atlantic Airways og er nevndarlimur í Vága Floghavn, umframt at vera nýttur sum ráðgevi hjá landsstýrinum í hesum máli.

Og argumentini hjá Johan í Niðristovu fyri at byggja út til 1799 metrar eru greið.

– Vit fáa ein longri vøll, ein størri trygdarmarginal og sum nevndarlimur í Vága Floghavn, meti eg at vit fáa seinastu 200 metrarnar sera bíliga. Vit fáa enntá møguleika fyri kapping, sum er nógv størri, enn um hann var 1600 metrar, sigur Jóhan í Niðristovu.

Sambært manninum við mongu hattunum, hevði støðan verið júst tann sama, um hann bert var flogskipari.

– Ein longri vøllur er altíð betri. Tað økir um trygdarmarginal og minkar um arbeiðsbyrðuna, tí tað gevur betri tíð at taka knappar avgerðir.

Jóhan í Niðristovu viðgongur tó, at flogvøllurin í Vágum hevur sínar avbjóðingar, men leggur afturat, at finst nakað øki í Føroyum, sum er betri egnað, so verður framvegis neyðugt við einum krossvølli.

Rúni Højgaard, formaður í flogskiparafelagnum, metir somuleiðis, at ein longri vøllur er betri, men hann ivast bara stórliga, um tað loysir seg at byggja vøllin í Vágum ov nógv út, um tað blokerar fyri einum øðrum vølli, sum sambært summum liggur eini 10 ár frammi í tíðini, meðan onnur tosa um 50 ár.

### Johan og Jóhan

Tað er Johan Dahl, sum er avvarðandi landsstýrismaður, og hann, sum er komin við uppskotinum at leingja flogvøllin til 1799 metrar.

Millum fremstu ráðgevarar hjá Johan Dahl hevur verið Jóhan í Niðristovu, sum hevur borið fleiri hattar, men Johan trýr meira upp á Jóhan enn nakran annan.

– Vit hava brúkt Jóhan í Niðristovu, tí hann hevur teir førleikar, sum vit hava sett prís uppá, at ein slíkur skal hava, og tí er tað ikki annað enn gott, at vit hava ein sum Jóhan í Niðristovu í Vága Floghavn, sum er einasta floghavn í Føroyum, sigur Johan Dahl.

Men meiningina flogskiparafelagnum og serliga hjá tyrluskiparanum, sum Rás2 tosaði við í farnu viku, gongur Johan Dahl ikki so høgt upp í.

– Eg eri ikki fakmaður, men eg kann bara fyrihalda meg til fakligheitini, og teir hava í hvussu so er størri førleikarnar enn piloturin tú nevnir har, sigur Johan Dahl.

Hann sigur somuleiðis, at skrivið frá flogskiparunum ikki fer at hava nakra ávirkan á gongdina við flogvøllinum.

– Eg havi ikki fyri neyðini at taka tað, sum flogskipararnir siga í betraktning. Uppgávan hjá flogskiparunum er at flúgva ferðafólk trygt aftur og fram, og tað er millum annað at trygdina vit betra við hesum, sigur Johan Dahl, og vísir til ósemjuna millum flogskipararnar.

### Bert pláss fyri Atlantic

Í uppskotinum, sum var í tinginum í gjár, stendur eisini, at ein longri vøllur kann lata upp fyri kapping millum fleiri flogfeløg.

Í tinginum í gjár var eisini Dávur R. Hansen, stjóri í Vága Floghavn, og hann vísir á, at ein longri vøllur kann lata upp fyri kapping, men tað skilst á honum, at hann ikki roknar við, at 1799 metrar eru nóg mikið fyri at loyva øðrum enn Atlantic Airways á vøllinum.

– Tað, at mann hevur longri flogvøll gevur møguleikar. Men tað kann gott vera, at Atlantsflog brúkar møguleikarnar so mikið væl, at tað ikki er pláss fyri nøkrum øðrum at koma at kappast.

*Hevði ein enn longri vøllur givið størri møguleika fyri kapping?*

– Ja, men um teir møguleikarnir standa mát við meirútreiðslurnar, sum tað er, dugi eg ikki at svara uppá, sigur Dávur R. Hansen.

Hann heldur somuleiðis, at regulariteturin ikki verður nógv størri, tí hann er longu góður, og at trygdin er longu góð.

### Verður gjørdur

Men beint nú liggur málið um hendan góða kilometur av asfalti, sum hevur verið umrøddur í sera nógv ár, í vinnunevndini hjá løgtinginum.

Nøkur ting tykjast tó greið.

Tingið vil illa fara upp um 365 milliónir danskar krónur í kostnaði. Arbeiðið verður boðið út í komandi viku. Vindkanningar av Glyvursnesi verða klárar í mars. Teir, sum ivast mest í útbyggingini vóru ikki í tinginum til viðgerðina av málinum, og vøllurin fer hvørki fer at betra trygd, regularitet ella kapping munandi. Men fer at loyva størri flogførum.